# Ruskinnsavningin verður broytt

**Ruskinnsavningin í Vágum verður umløgd í samband við umleggingina av økjunum hjá IRF. Innsavnararanir vænta verri tænastu, men tað væntar leiðslan í IRF ikki**

RUSK
*Edvard Joensen*



*Ruskinnsavningin hjá IRF verður umløgd. Í Vágum merkir tað, at størri øki skulu avgreiðast upp á nógv styttri tíð. Men tá sleppa innsavnararnir, sum taka húsarhaldsrusk, undan at taka rusk frá handlum og stovnum, sigur stjórin á IRF*

**Vágar:**
Tá ruskinnsavningin verður umløgd, soleiðis at Vágar verða lagdar saman við Norðureysturoy og Norðurstreymoy, fer tænastan at lækka munandi, heldur ein teirra, sum hevur koyrt ruskbilin í Vágum seinnu tíðina.

– Tað er ikki ætlanin, og tað meta vit heldur ikki fer at verða so, sigur stjórin hjá IRF.

Í fyrsta umfari hevur broytingin av skipanini hjá IRF havt við sær, at annar teirra, sum hevur koyrt innsavningarbilin í Vágum, er sagdur úr starvi. Lagt verður um soleiðis, at bilur kemur um Sundið at savna rusk í Vágum tveir dagar um vikuna. Hinar dagarnar verður so farið í Norðurstreymoy og Norðureysturoy. Bilurin veðru fluttur úr Vágum til at hava støð í Leirvík.

Eyðun Ellingsgaard, ið er tann av innsavnarunum í Vágum, ið ikki er sagdur úr starvi, sigur, at hann metir ikki, at nýggja ætlanin hjá IRF fer at vera á sama tænastustøði, sum tann, ið farið verður frá.

Eitt nú vísir hann á, at teir vanliga hava brúkt seks tímar til hvørja av bygdunum Sørvág og Miðvág. Men eftir nýggju skipanini, skal Sørvágur saman við Gásadali, Bø, Vatnsoyrum og Miðvági klárast við 5,7 tímum.

Sett er eisini upp í uppskotinum, at takast skulu sjey tons av ruski á hesum túrinum.

Men tað fer ikki at bera til, sigur Eyðun Ellingsgaard, tí bilurin klárar bara at lasta hávtfjórða tons. So hann skal tømast minst einaferð á rutuni, og tað tekur út móti teimum tínum at fara úr Vágum til Leirvíkar og koma aftur at savna víðari.

Heldur ikki heldur hann posatalið, IRF hevur sett upp, vera rætt. Og at hvør posin í meðal vigar 10 kg, sigur hann ver alt ov lágt sett.

Stjórin á IRF viðgongur, at bilurin, sum savnar inn í Vágum bara lasta hálvtfjórða tons, og at tað er ov lítið til ta nøgd, hann skal taka. Hetta kemst av, at bilurin er gjørdur til at sleppa runt har, trongt og illa atkomiligt er.

Hinvegin kann tann trupulleikin loysast við einum størri bili ella at seta ein aksil eyka undir bilin. Tað fer so hinvegin aftur at gera tað truplari at koma runt, væntar stjórin.

Eyðun Ellingsgaard vísir á, at eftir nýggju skipanini fer ikki at bera til at taka rusk frá eitt nú virkjum og handlum, fyri ikki at tala um bingjuplássini.

Poul Andrias Joensen, stjóriá IRF ásannar, at skipanin tykist øðrvísi enn tann, sum farið verður frá. Og tað er eisini ætlanin, sigur hann.

Hvussu tíðarætlanin fer at halda, viðgongur hann, at hann ikki kann siga nakað um soleiðis beinanveg.

Men innsavningin í síni heild verður umskipað soleiðis, at tann bilurin, sum skal taka húsarhaldsruskið, skal ikki taka nakað annað. Tískil skuldið verðið væl rúmligari á tíðarætlanini hjá innsavningarbilinum.

Eisini verður broyting gjørd soleiðis, at tað í framtíðini verða tríggir mans við bilinum móti tveimum í dag.

Her verður skipanin í framtíðini tann, at vanligu innsavningarbilarnir skulu bara taka húsarhaldsrusk, og ikki sum fyrr rusk frá handlum og stovnum. Tað skulu aðrir bilar gera, sigur Poul Andrias Joensen.

Skipanin verður tann, at størri bilar hjá IRF fara at koyra runt eftir handilsruski og slíkum, sum latið verður á bingjuplássini. Hesir bilarnir fara eisini at koyra eftir fastlagdari rutu, sigur hann.

## Bitland nevndin vald

**Tólv føroyskar fyritøkur og stovnar stovnaðu hósdagin smápartafelagið Bitland**

KUNNINGARTØKNI

Smápartafelagið Bitland varð stovnað hósdagin, og menningarstjórin á Føroya Tele varð valdur til nevndarformann. Stjóri í Felagnum er Ólavur Greggersen.

Talan er um feløg alt frá flogfeløgum til Arbeiðsgevarafelagið, sum hava stovnað partafelagið Bitland, ið hevur til endamáls at stimbra nýskapan og altjóðagerð innan tøknifyritøkur í Føroyum.

Nevndarformaður í Bitland er Tróndur Djurhuus, menningarstjóri á Føroya Tele. Nevndarlimirnir eru Petur Zachariasen, formaður í Sparikassagrunninum, Niels Christian Nolsøe, stjóri á Elektron, Wilhelm Petersen, stjóri á Atlantic Petroleum, Henrik Hansen, menningarstjóri hjá Canon og Ólavur Ellefsen, stjóri í Semprentis.

Ólavur gregersen, stjóri í Bitland, sigur í tíðindaskrivi, at nevnd og stjórn nú eru farin til verka at leggja nágreiniligar ætlanir fyri virksemi felagsins.

ej

# Sjúklingavegleiðingin bíðar

**Fundur varð mikudagin millum sjúklingavegleiðingina á Riskissjúkrahúsinum og leiðsluna á Hotel Tórshavn. Avrátt varð at bíða við at taka nakra avgerð, til politiska støðan í Føroyum er komin í fasta legu**

SJÚKLINGAVEGLEIÐING
*Edvard Joensen*

Sjúklingavegleiðingin á Ríkissjúkrahúsinum heldur fyribils fram óbroytt. Tað var úrslitið av fundi, sum hildin varð í Keypmannahavn mikudagin.

Uppskotið hjá leiðsluni á Hotel Tórshavn um at umskipa sjúklingavegleiðingina á Ríkissjúkrahúsinum hevur møtt mótstøðu.

Fleiri, teirra, sum á einhvønn hátt hava havt okkurt við vegleiðingina at gera, halda ikki, at tað er rætt, tá leiðslan á Hotel Tórshavn metir, at bert er brúk fyri vegleiðing seks tímar um vikuna. Tað er alt ov lágt sett, halda tey, og mæla hivegin til, at tímatalið veður økt.

So mikið av kjakið hevur staðist av hesum málinum, at avtalaður varð fundur millum leiðsluna á Hotel Tórshavn og vegleiðaran.

Eleonora Olsen, sum er sjúklingavegleiðari, sigur við Sosialin, at hon á fundinum mikudagin legði síni sjónarmið fram, eins og leiðslan hevði síni.

Fundurin kom ikki til nakra niðurstøðu, sigur Eleonora Olsen, uttan ta, at hildið varð best at bíða við at taka nakra endaliga avgerð, til nýtt landsstýri var skipað í Føroyum, og tað soleiðis fekst at vita frá nýggja landsstýrismanninum, sum fer at varða av málinum, hvussu ynskiligt verður, at skipanin skal vera í framtíðini.

Tískil heldur verandi skipan við sjúklingavegleiðing á Ríkissjúkrahúsinum fram sum higartil. Í hvussu er til ein nýggjur landsstýrismaður vil nakað annað, sigur Eleonora Olsen.

Tað eydnaðist ikki at hitta leiðaran á Hoel Tórshavn áðrenn blaðið fór til prentingar.



*Leiðslan á Hotel Tórshavn og sjúklingavegleiðingin á Ríkissjúkrahúsinum eru samdar um, at verandi vegleiðing fyribils heldur fram, til nýtt landsstýri er skipað og onnur boð koma haðani*



Føroya Fiskasøla:

# Væntar príshækking á aldum laksi

**– Orsøkin til, at prísirnir á feskum laksi hava verið so lágir, er í fyrsta lagi, at marknaðurin er sprongdur. Kreppa er í alivinnuni, bæði her heima og rundan um okkum, og tí er væntandi, at nógv minni fiskur verður á marknaðinum í hesm árinum. Tað merkir, at útlit eru til príshækkingar á aldum laksi, sigur Birgir Kass, sølumaður á Føroya Fiskasølu, sum kortini ikki torir at spáa, hvør príslegan væntandi verður**

PRÍSÚTLIT
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Birgir Kass, sølumaður hjá Føroya Fiskasølu, sigur, at norðmenn eru optimistiskir og vænta, at prísurin á feskum laksi sum frá líður fer uppá einar 30 krónur fyri kilo. Sjálvur torir hann ikki at geva nakað boð uppá prísgongdina, men vísir á, at kemur prísurin uppá einar 21 krónur fyri kilo, verður tað aftur áhugavert at ala laks í Føroyum*

Øll alivinnan liggur í andaleypi. Smoltstøðir og alistøðir eru farnar á húsagang ella hava lagt árarnar inn, tí virksemið ikki er lønandi. Fíggingartørvurin í alivinnuni er stórur, og tað er váðin við at læna pengarnar eisini. Nógvir pengar eru mistir, og tað skal nógv til, um alivinnan aftur skal reisa seg og aftur fáa tann týdning, henda vinna hevur havt. Sjúka hevur gjørt feigdina um seg og hevur gjørt tað neyðugt at taka laksin fyri tíðina. Aftrat veldugu laksaframleiðsluni, hevur sjúkan verið viðvirkandi til, at marknaðurin er sprongdur. Aliøkir eru løgd lamin, og neyðugt hevur verið at flyta virksemið, ið eftir var, til onnur øki.

Smoltalarar hava fáar ella ongar avtakarar, tí alifeløgini vita ikki, um lánsveitarar vilja veita fígging til útseting. Lánsveitarar hava "brent" seg og tora illa at váða meira pening, fyrr enn marknaðarútlitini eru betur, og í kjalavørrinum spøkir ILA-sjúkan alla tíðina.

### Betri prísútlit

Føroya Fiskasøla er millum sølufeløgini, sum selir framleiðsluna av føroyskum alifiski. Í fjør seldi fyritøkan eini 6.000 tons av feskum laksi og sílum. Aftrat hesum hevur Fiskasølan eitt virki í Fuglafirði, har eini 80 fólk framleiða portiónir, sum verða seldar á útlendska marknaðin. Felagið eigur eisini í alifelagnum, Eystlaksi í Norðoyggjum og Faroe Fishfarming í Suðuroy.

Sosialurin hevur vent sær til Birgir Kass, sum selir laks fyri Føroya Fiskasølu.

Hann vísir á, at alivinnan sum heild er í kreppu, bæði í Noregi, Hetlandi, Skotlandi og í Norðurameriku.

– Orsøkin er í fyrsta lagi, at framleiðslan hevur verið ov stór í mun til tað, sum marknaðurin tolir. Haraftrat eru alibrúk rakt av sjúkum, sum hevur ført til, at fiskur er tikin fyri tíðina. Hetta hevur eisini verið við til at lagt trýst á marknaðin.

Birgir sigur, at nú framleiðslan av alifiski í Føroyum og í londunum rundan um okkum er munandi minni, er væntandi, at prísirnir fara at hækka.

– Onkur væntar, at prísirnir fara at hækka eftir páskir, og onkur væntar, at teir fara at hækka eftir summarfrítíðina. Ilt er at siga, hvør príslegan verður, men við munandi minni fiski á marknaðinum, er lítil ivi um, at prísgongdin verður rætta vegin.

Hann sigur, at norðmenn eru optimistiskir og vænta, at prísirnir sum frá líður fara uppá einar 30 krónur fyri kilo av feskum laksi.

– Eg tori ikki at geva nakað boð uppá prísgongdina, men greitt er, at kemur prísurin á feskum laksi uppá 21 krónur í miðal fyri kilo, verður tað aftur áhugavert at ala laks í Føroyum.

### Torført at spáa

Birgir leggur dent á, at verður eingin øking í prísinum, verður ógvuliga torført hjá alivinnuni at fóta sær aftur í bræði.

Hann sigur, at føroyskir alarar tóku eini 50.000 tons av laksi og sílum í fjør, ið partvís vórðu útflutt sum fekst og partvís sum portiónir. Av hesum var nøgdin av laksi eini 43.000 tons.

– Vit seldu eini 6.000 tons av feskum laksi og sílum í fjør, og tað er greitt, at talið verður munandi minni í ár.

Spurdur, um talið væntandi verður helvtina minni, sigur hann, at tað er ikki óhugsandi, at nøgdin verður uppaftur minni.

– Alivinnan er í stórari kreppu, og tí er ógjørligt longu nú at siga, hvussu hetta árið fer at roynast, sigur Birgir Kass at enda.

Eitt, sum eisini kann væntast at fáa týdning og verða til bata fyri føroysku alivinnuna í framtíðini, er koppseting móti ILA, sum tó enn ikki er loyvd.

# Fiskiveiðisamráðingar í norska høvuðsstaðnum

**Hósdagin og fríggjadagin vóru fiskivinnusamráðingar í Oslo millum føroyingar um norðmenn um sínámillum fiskiveiðirættindi hjá hvørjum øðrum. Ætlandi skuldu hesar samráðingar vera fyri nýggjár, men vórðu útsettar eftir norskum ynski**

SAMRÁÐINGAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fiskimálaráðið sigur, at Føroyar hava fullnýtt sína botnfiskakvotu í Barentshavinum í 2003, og møguleikarnir at fiska makrel í norskum sjógvi vórðu eisini nýttir til fulnar. Føroysku kvoturnar av ídnaðarfiski og upsa í Norðsjónum vórðu ikki uppfiskaðar, tá ið árið var úti.

Norðmenn hava hinvegin fullnýtt allar sínar kvotur í føroyskum sjógvi. Hesar snúgva seg serliga um línuveiði eftir blálongu og brosmu og svartkjaftakvotuna, sum norðmenn hava í føroyskum sjógvi.

– Sambært teirri øking, sum Russland og Noregi eru komin ásamt um, verður heildarveiðan av toski og hýsu í Barentshavinum hækkað við 20%. Vit meta, at hetta gevur grundarlag fyri hækking av føroysku botnfiskakvotuni í norskum sjógvi - við somu øking.

Í Fiskimálaráðnum vísa tey á, at bann er sett fyri lodnuveiði í norskum sjógvi, og tí verður eingin lodnukvota við í avtaluni fyri 2004.



*Í gjár og fyrradagin vóru fiskiveiðisamráðingarnar í Oslo millum føroyingar og norðmenn*

### Fyribilsavtala

– Hóast samráðingarnar millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskiskap í 2004 ikki eru fyrr enn nú, hava føroysk skip kunnað hildið fram at fiska í norskum sjógvi, eins og norsk skip hava kunnað fiskað í føroyskum sjógvi. Hetta tryggjar ein fyribils avtala millum londini fyri 2004, sum varð gjørd í samband við, at samráðingarnar vórðu útsettar, sigur Fiskimálaráðið.

Føroyskur samráðingarleiðari í Noregi er Kaj P. Mortensen, aðalstjóri í Fiskimálaráðnum.

Í føroysku samráðingarnevndini eru eisini umboð fyri Fiskiveiðieftirlitið, Fiskirannsóknarstovuna, Reiðarafelagið og danska uttanríkismálaráðið.

Áðrenn evsta mark hjá Sosialinum í gjár, var ikki greitt, hvussu samráðingarnar millum partarnar hava gingið.